# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

**Evni:** Próvtøkur á miðnámi summarið 2022

**Spurningar:**

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera tillagingar í próvtøkunum á miðnámi í summar?
2. Kann tað hugsast, at talið á próvtøkum verður broytt, soleiðis at næmingarnir skulu upp til færri próvtøkur í summar?
3. Um nei til spurning 2, kann tað hugsast, at landsstýrismaðurin sum eitt alternativ vil minka pensumkravið í einstøku lærugreinunum í sambandi við próvtøkurnar í summar?

**Viðmerkingar** :
Hóast seinastu koronutiltøkini nú eru tikin av, er ávirkanin frá koronutíðini framvegis her. Hugsa vit um næmingarnar á miðnámi, ið skulu upp til próvtøku í summar, so fara møguleikarnir fyri góðum úrsliti í summar at verða merktir av koronutíðini.

Hóast miðnámsskúlarnir ikki hava verið beinleiðis stongdir í hesum skúlaárinum, so hava skúlarnir verið nógv ávirkaðir av koronu. Næmingar og lærarar hava verið sjúkir og/ella í sóttarhaldi stóran part av skúlaárinum - serliga frá heystfrítíðini og til jólar.

Hóast skúlarnir ikki hava verið beinleiðis stongdir, so hevur ávirkanin merkt undirvísingina og næmingar hava verið sjúkir og í sóttarhaldi upp á skift. Hóast fjarundirvísing kann vera eitt gott amboð í styttri tíðarskeið, er nógv, ið týðir á, at fjarundirvísing ikki gevur sama úrslit sum vanlig undirvísing, hvørki tá ið tað kemur til læring hjá einstaka næminginum og eiheldur, tá vit hugsa um at náa ásetta pensum.

Haraftrat hava elstu flokkarnir, ið skulu til endaliga próvtøku í summar, verið ávirkaðir av koronufarsóttini í tvey skúlaár. Hetta kann geva næmingunum eitt verri útgangsstøði í sambandi við próvtøkurnar og tí ávirka próvtølini. Hesi próvtøl eru avgerandi fyri miðaltalið hjá næmingum í endaflokkunum og fer at ávirka møguleikarnar fyri upptøku á hægri lestri í summar.

Tann 25. februar 2022 varð avtala gjørd í Danmark, har avgjørt er, at næmingar, ið skulu til fráfaringarroynd fólkaskúlans og endaflokkarnir á gymnasialum miðnámi, skulu upp til færri próvtøkur í summar.

Havandi í huga at ikki so fáir næmingar í Føroyum søkja inn á víðari lestur uttanlands, vil tað verða munur á fortreytunum at søkja víðari, um einki verður gjørt fyri at avmarka próvtøkurnar hjá hesum næmingum.

**Á Løgtingi, 28. februar 2022**

Eyðgunn Samuelsen